gult10 cyan10 magenta10 svart10

VIÐMERKINGAR

Hvussi ofta ringir postboðið?

Johan Mortensen

Tá eg var smádrongur í Brekkugøtu var eg altíð sera hugtikin av okkara postboð, Eiler Rubeksen.

Hesin altíð fryntiligi og blíði maðurin í sínum vakra reyða postjakka var ein føst og góð mynd í mínum barnahuga, ein stabilitetur har hann í øllum veðri kom niðan Sjúrðagøtu við fullari skjáttu av posti.

Eg havi síðan ofta hugsað um, hvussu stóran leiklut postboðið hevði í mínum uppvøkstri og haldi eg, tey allarflestu hava havt somu góðu upppliving.

Sum tíðir líða eri eg komin til at hava eina enn størri virðing fyri postmanninum og postverkinum. Hesi fólk sum í øllum veðri tíma at bera mær og mínum okkara dagbløð, okkara brøv og allar tær mongu, líkasælu lýsingarnar. Somu fólk sum fara upp árla á morgni at skilja post so eg kann taka hann í postboksini á veg til arbeiðis og somu fólk sum skilja post til kl 20.30 á kvøldi skuldi eg tørva at fingið fatur á brøvum um kvøldið. Og ikki er teirra løn og samsýning nakar harragarður heldur. Tøkkin heldur ikki, vælsaktans.

Føroyska Postverkið er vælvirkandi og er ein ómetaliga týdningarmikil partur av okkara hvønndagi og av okkara lívsvirðum

Tað er tí sera hugstoytt at hoyra, hvussu illa gongst leiðsluni hjá Postverkinum og politiska myndugleikanum at fáa hesum stovni mannsømulig kor. Tað má vera lítið motiverandi hjá starvssfólkunum hvørt ár at hoyra, at nú skal munandi tal av fólki sigast upp, og ikki mugu tey verða nógv, sum ídag hugsa um at fáa sær framtíðar yrki innan Postverkið.

Sjálvandi skal Postverkið fylgja við tíðini, men haldi eg, at tær ábøtur, sum Postfelagið hevur skotið upp eru nøktandi. Tað er harmuligt, at ringt politiskt handalag hevur forðað fyri hesum ábøtum, og at nú – uppá mest primitivan hátt – skal skerjast í starvsfólkatali. Hetta er ein ómegd sum hoyrir fortíðar leiðsluháttum til, ikki ídag, har allir ábyrgdarfullir leiðarar skilja, at starvsfólkið er týdningarmesta aktivið hjá einari fyritøku.

Sum limur í Tjóðveldisflokkinum heiti eg á manning okkara á tingi og landsstýri at fáa greitt hetta mál, sum er óveruligt og ein háðan móti okkara postfólki. Hesin stovnur verður at syndrast, um ikki skjótt verður borið at. Kanska Páll á Reynatúgvu skuldi roynt sínar gávur sum millumgongumaður á hesum øki.

Eisini liggur ein stór ábyrgd á Postmeistaranum. Hann má sýna í verki, at hann yvirhøvur er førur fyri at røkja hetta starv til lýtar og vísa, at hann hevur tann neyðuga leiðsluførleikan, tað nyttar ikki sum tænastumaður sum frægast at skjóta seg inn undir politiskar frasur og vera servilur og undirbrotligur hóast hetta er tað lættasta. Postmeistarin má bróta nasar fyri sínum starvsfólki.

Mín samhugi er so við starvsfólkunum á Postverkinum.

Lagkøkan verður javnari býtt uttan blokkstuðul - skommin liggur í heimastýrinum

Høgni Hoydal

Hans Pauli Strøm hevur í tveimum greinum roynt at fjala tann veruleika, sum undirritaði vísti á í grein herfyri. Nevniliga, at meðan vit gera okkum leys av blokkstuðli, raðfesta vit júst almannamál, heilsumál, mentan, útbúgving og gransking nógv hægri í okkara landshúsarhaldi.

Undir heimastýrinum, har vit nýttu allan blokkin og læntu okkum út á sjógv, varð almanna-, heilsuverkið og skúlaverkið ikki raðfest og at enda niðurpínt. Tað fer at taka nógv ár at rudda eftir skommina í heimastýrinum.

Lagkøkan verður nú javnari býtt, um hjáløgdu talvur vísa. Hans Pauli kann ikki afturvísa hesum, og tí roynir hann at koma við sínum roykløri av heilt øðrum tølum.

Tað er sera betonkiligt fyri ein mann, sum veit betur, tí hann starvast við tølum dagliga. Hans Pauli kundi skjótt og greitt havt sett upp tøl, sum júst prógva tað, ið undirritaði hevur víst á.

Niðurpíningin undir heimastýrinum

Onki er skorið niður á hesum økjum, men hinvegin økt undir hesum landsstýri. Vit brúka nú 2/3 av hvørjari krónu til hesi endamál, meðan vit í heimastýrisbúskapinum bert brúktu helvtina av hvørji krónu. Og undir hesi samgongu eru hesi økini hækkað nógv meiri enn øll árini frá 1990-1998. At Hans Pauli fer at tosa um prístalsreguleringar og hvat átti at verðið gjørt frá 1990-1998, er heilt annað mál, og har má hann leita aðrastaðni fyri at finna fívlar.

Ongin hevur sagt, at vit á nakran hátt hava loyst teir stóru trupulleikarnar á eitt nú røktarheimsøkinum ella bústaðarviðurskiftini hjá brekaðum. Tað, sum hevur verið forsømt í meira enn 20 ár, verður ikki loyst eftir einum samgonguskeiði. Tað fer at taka fleiri ár at fáa rímilig viðurskifti á mongum økjum.

Men raðfestingarnar eru greiðar og byggja á eitt veruligt búskaparligt grundarlag. Við politikkinum, sum Hans Pauli mælir til, fara Føroyar aftur á húsagang eftir fáum árum – og hvør rindar tá gildið?

Vís alla myndina, Hans Pauli.

Men hetta vil Hans Pauli Strøm ikki tosa um. Hann hevur ístaðin tosað um tað,ið fór fram undir kreppuni og hevur lastað sitandi landsstýrið fyri tað. Hans Pauli hevur ístaðin tosað um teir lønarniðurskurðir og niðurskurðir á øllum økjum, sum fóru fram fyrrapartin av hálvfemsunum – og brúkar tað til at lasta sitandi landsstýrið.

Tað er ikki reelt. Um Hans Pauli var reellur, so hevði hann víst, hvussu raðfestingarnar frá 1990 – 1998 samsvaraðu við hansara prístalsútroknningar. Hvussu nógv hækkaði reallønin áðrenn fullveldisætlanin kom á dagsskránna í mun til prístalið? Hvussu nógv varð sett av til íløgur í sjúkrahús, eldrarøkt, skúlar, serforsorg o.s.fr.?

Og um Hans Pauli var reellur, so hevði hann eisini tikið við, hvussu nógv kommunurnar brúka uppá tildømis eldrarøkt, barnaansing og heilsumál í dag í mun til í 1998.

Tá hevði myndin víst júst tað, sum Hans Pauli nú roynir at afturvísa.





Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg

gult11 cyan11 magenta11 svart11

Í dag kemur Sovereign Explorer, boripallurin, sum skal bora fyri Statoil, í føroyskan sjógv

Ævintýrið er byrjað…

Sovereign Explorer kemur í føroyskan sjógv í dag

OLJUVINNA
Eirikur Lindenskov

Í dag kemur boripallurin, sum skal bora fyri Statoil, Sovereign Explorer, í føroyskan sjógv. Í næstu viku verður borurin væntandi settur í føroysku undirgrundina, og longu tá kann roknast við, at eini 1.000 – 1.200 fólk arbeiða í oljuvinnuni í Føroyum.

Í næstum kemur Westnavion, boriskipið, sum skal bora fyri BP, í føroyskan sjógv.Øll – sum arbeiða í frálandavinnuni – skulu gjalda 35% í skatti í Føroyum frá fyrsta degi.

Í Havn sæst aktiviteturin longu av oljuvinnuni. Bara í fyrisitingunum hjá oljufeløgunum starvast millum 50 og 100 fólk, men fer framleiðslan í gongd kann hetta talið faldast við 100.

Øll hesi fólk skulu eisini ferðast um flogvøllin í Vágum, so oljuævintýrið er byrjað…

Loyvishavarin hevur ábyrgdina

Verður olja funnin, verður talan um stóra umsiting,. Men bara leitivirksemið fer at geva skattaumsitingin nógv at gera

OLJUSKATTUR
Eirikur Lindenskov

Seinastu tíðina hevur gingið sum rótasúpan, at deildin hjá Tolli og Skatti, sum skal krevja inn skattin úr oljuvinnuni, ikki skal liggja í Havn, men í Klaksvík.

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, segði við Sosialin í gjár, at eingin avgerð enn er tikin um, hvar deildin skal liggja, men at hann í tinginum hevur ført fram, at deildin ikki skal liggja í Havn.

Skattafyrisitingin er býtt upp í økisskrivstovur, har tann størsta er tann fyri Suðurstreym. Keldur, sum Sosialurin hevur tosað við siga, at tað sum so eingin trupulleiki er at gera eina serskilda deild at taka sær av innkrevjingini frá oljuvinnuni, og at tað eisini ber til at leggja hana aðrastaðni enn í Havn.

Einasti trupulleikin er, at oljufeløgnin hava sínar høvuðsskrivstovur í Havn, og tað verða tey, sum koma at samskifta við oljuskattadeildina, og tað verður kanska truplari, liggur hon langt burtur frá Havnini.

Men greitt er, at verður olja funnin, so verður talan um eina stóra fyrisiting, tí øll sum fara at arbeiða í føroyskum sjóøki skulu rinda 35% í skatti í Føroyum.

Ábyrgdina fyri, at øll skattaviðurskiftini eru í lagi, hevur loyvishavarin, so tað verða oljufeløgini, sum skulu tryggja, at øll hesi viðurskiftini eru í lagi.

Fyrsti brunnurin á føroyska landgrunninum boraður í næstu viku

– Vit mugu tó ikki gloyma, at vit tosa um leitiboringar, og at flestu oljuframleiðandi londini rundan um okkum høvdu long leitiskeið, áðrenn framleiðsluverdar nødir av kolvetni vórðu funnar, sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum

Statoil fekk endaligu góðkenningina seinnapartin í gjár

OLJUVINNA
Eirikur Lindenskov

Beint fyri evstamark hjá Sosialinum í gjár komu boðini frá Oljumálastýrinum um, at Statoil seinnapartin í gjár fór at fáa góðkenningina at fara undir fyrstu leitiboringina eftir olju á føroyska landgrunninum.

– Boripallurin Sovereign Explorer, sum skal bora brunnin hjá Statoil samtakinum, er á veg móti Føroyum og verður væntandi á boristaðnum í morgin, segði Oljumálastýrið tíðindaskrivi.

Transocean, sum eigur pallin, roknar við, at eini fýra dagar ganga við at leggja pallin fyri akker á røttum stað, soleiðis at boringin kann byrja um miðu næstu viku.

Statoil hevur loyvi nummar 003, sum fevnir um eitt økið í ein landsynning úr Føroyum tætt við bretska markið. Brunnurin verður boraður á Longan leitmiðinum á 5° 11' 03.38"V og 60° 30'50.09" N. Havdýpið á staðnum er 941 metrar.

Boringini er mett at taka 2-3 mánaðar.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum, sigur, at tað er ein spennandi tíð við nógvum avbjóðingum, sum liggur fyri framman:

– Vit mugu tó ikki gloyma, at vit tosa um leitiboringar, og at flestu oljuframleiðandi londini rundan um okkum høvdu long leitiskeið, áðrenn framleiðsluverdar nødir av kolvetni vórðu funnar.

Vit hava fingið ein stóran møguleika, sum eg haldi, vit skulu taka. Tað er ongin grund at stúra fyri, at tað ikki skal eydnast Føroyum at skipa oljuvinnuna á ein hátt, sum kemur samfelagnum til góðar, samstundis sum vit tryggja, at oljuvinnan ikki fær ov stóra ávirkan á samfelagið, mál og mentan.

– Eg eri vísur í, at ein møgulig oljuframleiðsla ber fleiri møguleikar enn vansar við sær, sigur hann.

Fyrsta loyvisumfarið á føroyska landgrunninum varð latið upp 17. februar 2000, og móttók Oljumálastýrið 22 umsóknir frá 17 feløgum. 17. august sama ár veitti landsstýrismaðurin í oljumálum 7 leiti- og framleiðsluloyvi til 12 feløg, tey flestu skipað í samtøk.

Umframt Statoil fara BP og Amerada Hess samtakið eftir ætlan eisini at bora í summar.

Gávuhugskot...
til studentin, brúðarparið, ella bara onkran tú vilt gleða...
Olympus mju 80
við 38-80 mm linsu
Ultrakompakt, lætt myndatól við autofokus.
Sera vælegnað bæði til portrettmyndir og landskapsmyndir.

Verður latið í spennandi gávueskju við myndatóli, filmi, battarii, tasku og einum flottum Olympus uri.
BERT 1.695,-
3 ár
SMS · Tel 353535 · Fax 353536 · www.3-arin.com · 3-arin@3-arin.com